B68-Skála 1-0 (1-0):

# Albert og B68 verjan hildu aftur tætt

**Sama gongdin, sum higartil hevur givið Skála so lítla úrtøku, gjørdi seg aftur galdandi á Svangaskarði**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað hevur so ofta verið nevnt fyrr í summar, og tað kanska kennist eitt sindur troyttandi, men tað var aftur sunnudagin ein veruleiki. Serliga í 1. hálvleiki vóru tað skálamenn, sum vóru spælstýrandi, tá ið teir vitjaðu á Toftum. Á miðvøllinum høvdu teir nógv størri tyngd enn heimamenninir. Teir vunnu nærdystirnar, teir vóru betri við bóltinum, teir fluttu seg betur, og harvið høvdu teir lættari við at finna hvønn annan. Sveinur Justinssen og Alexander Jovevic dugdu væl at streiða sendingarnar í borðini og fram eftir miðásinum, og tað sá ikki so galið út.

Men sum so mangan – ella rættari næstan hvørja ferð – so spurdist eingin úrtøka burturúr. Albert Sævarson hevði góðar bjargingar eftir royndir frá Jónhardi Frederiksberg og Alexander Johansen, men fyri tað mesta var lítil og eingin tyngd í Skála spælinum, tá ið teir nærkaðust brotsteiginum hjá heimamonnunum, og talan var um ongan brodd, tá ið tað skuldi roynast ímóti málinum.

Tríggjar teir fyrstu minuttirnar vóru toftamenn omaná, men so tók Skála yvir, og tá ið teir ferð eftir ferð høvdu verið kring og í brotsteiginum, uttan at teir høvdu megnað at fingið mál – eisini tá ið teir fleiri ferðir høvdu verið tríggir ímóti tveimum – so líka sum fánaði møguleikin fyri, at tað skuldi lata seg gera.

B68 royndi at flyta verjuna langt fram á vøllin. Tað var rættuliga vandamikið hjá teimum, men linjuverjin var vakin, og hóast tað onkra ferðina var heilt tepurt, so duttu Bogi Gregersen, Jónhard Frederiksberg og Alexander Johansen mest sum hvørja ferð í felluna.

Og so gekk tað, sum tað so ógvuliga ofta hevur gjørt í fótbólti. B68 hevði verið rárur gestur í brotsteiginum hjá Eugen Voda, men tað vóru kortini teir, sum fingu fyrsta málið. John Heri Dam fekk eftir Skála horna og skjótt útspæl fyrsta møguleikan, tá ið hann varð spældur leysur mitt fyri, men meðan hann ivaðist í, um hann skuldi lyfta upp um málverjan, ella um hann skuldi sneiða framvið honum, varð hann takladur. So legði Dánial Hansen í yvirtíðini í fyrra umfarinum høgt fríspark úr høgru og til handara stólpan, har Hans Fróði Hansen var rættiliga vandamikil í luftkrígnum við Eugen Voda. Bólturin fór úr aftur brotsteiginum og eitt sindur í vinstru til Jóhan Petur Poulsen, sum lyfti innfyri aftur. Sendingin tóktist liggja eitt vet aftanfyri púra leysa John Hera Dam, sum framúr hegnisliga í besta Zuma stíli við hælinum lyfti bóltin upp um seg sjálvan og harvið gjørdist púra leysur og var nóg kaldur at seta framvið málverjanum. Eitt flott mál sum saman við tí, sum Jóhan Petur Poulsen skoraði ímóti HB, man vera besti kandidatur higartil til ársins mál á Svangaskarði.

### Noyddust at umskipa

Fróði Benjaminsen hevur ikki átt sama leiklut higartil í ár, sum hann hevur havt seinastu árini. Eitt nú hevur hann ikki verið so málsøkin, sum hann ofta hevur verið. Ímóti Skála var hann leikbannaður, og tá sást sera væl, at hann ikki var við. Tað var ov lítil tyngd í sentrala miðvallar spælinum hjá heimaliðnum, og tað var sjáldan, at tað eydnaðist at fáa skipað álopsspæl í lag.

B68 var í 3-5-2 útgangsstøðu, men teir umskipaðu skjótt, soleiðis at Dánial Hansen fór aftur á vongverjan í høgru, Arnbjørn Danielsen í vinstru og John Heri Dam í álopið í 4-4-2 skipan. Miðskeiðis í 1. hálvleiki noyddist Arnbjørn Danielsen at taka seg buturúr, og tá var aftur neyðugt at umskipa.

Eftir eitt lítið korter av seinna umfarinum sá Alexander Jovevic gula kortið fyri aðru ferð, og tað átti at havt við sær, at tað loysnaði hjá B68. Men soleiðis tók tað seg ikki upp. Skipaðum spæli var í seinna umfarinum lítið av. Sum tíðin leið, royndi Skála at flyta meiri fólk fram, men Hans Fróði, Jákup Eli, Dánial og ikki minst Albert Sævarsson í málinum, sum aftur hesa ferð vísti, hvussu sera væl hann dugur at lesa spælið, vóru rættuliga drúgvir.

At skálamenn sleptu alt meiri í verjupartinum hevði við sær, at B68 hevði møguleikar, men tað kom ikki meiri burturúr.

Skálamenn løgdu rygg til enn eitt tap, og toftamenn vunnu 1-0 fyri triðju ferð í ár. Eftir ellivu umfør hava teir 20 stig við málmuninum 13-7. Tað man vera fram ímóti onkrum slagi av meti.

### Dysturin í tølum

**B68-Skála 1-0**
**1-0: John Heri Dam 45.**
**B68:** Albert Sævarsson – Arnbjørn Danielsen (Øssur Jacobsen, 23.), Hans Fróði Hansen, Jákup Eli Olsen – Jóhan Petur Poulsen (Jóhan Dávur Højgaard, 82.), Bogi Petersen, Jann Ingi Petersen (Kristian Anton Andreasen, 73.), Øssur Hansen, John Heri Dam – Dánial Hansen, Súni Fríði Johannesen
**Gult kort:** Øssur Jacobsen, Jann Ingi Petersen, John Heri Dam, Jóhan Petur Poulsen, Súni Fríði Johannesen
**Skála:** Eugen Voda – Marius Joensen, Ronnie Hansen, Jaic Dusan, Hanus Thorleifsson – Alexander Jovevic, Pauli G. Hansen, Sveinur Justinussen, Alexander Johansen (Jógvan Martin Hansen, 74.) – Bogi Gregersen, Jónhard Frederiksberg (Bárður Danielsen, 74.)
**Gult kort:** Pauli G. Hansen, Alexander Jovevic, Bogi Gregersen
**Reytt kort:** Alexander Jovevic 59. (tvey gul)

**Dómari:** Birgir Sondum



*John Heri Dam skoraði eitt perlumál á Svangaskarði sunnudagin*

Sumba-ÍF 0-0:

## Fuglfirðingar eru væl nøgdir

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Fuglfirðingar eru lættir, eftir at teir hava gjørt ferðina suður til Sumbiar burtur av sær. Eftir summarsteðgin skal ÍF tríggjar ferðir um Suðuroyarfjørð. Fyrsta ferðin endaði málleys á Krossinum í Sumba.

Tað var eitt lot, og ÍF hevði lotið undan í fyrra umfarinum. ÍF hevði bóltin eitt sindur meiri í 1. hálvleiki, men teir megnaðu so at siga ikki at spæla seg til málmøguleikar. Onkra forkølaða skotroynd úti frá høvdu teir, og onkran hálvan møguleika, sum tað kortini ikki spurdist nakað burturúr.

Eftir steðgin ráddi fyri tað mesta um hjá ÍF at verja. Sumbingar royndu at pressa og leggja trýst á. Teir høvdu væl størri trýst á mótstøðumálið, enn ÍF hevði havt í 1. hálvleiki, men teimum eydnaðist ikki at fáa bóltin framvið Jákup Helga Egholm, sum hesa ferð vardi málið í staðin fyri leikbannaða Fróða Poulsen.

Tá ið Robert Cieslewicz í síni tíð kom úr Pólandi og til Føroya, var tað til Fuglafirðar. Síðani ÍF flutti niður í 2. deild hevur pólverjin verið í fleiri feløgum, og nú er hann spælandi venjari í Sumba. Hesa ferð var um reppið, at hann skoraði sigursmálið, sum kundi havt við sær, at munurin frá ÍF og aftur til Sumba hevði minkað so nógv, at møguleikarnir fyri oddasessinum høvdu verið nærri, enn teir nú tykjast vera. Men Jákup Helgi Egholm vann tvídystin teirra millum.

Sumbingar høvdu eina ferð bóltin á stólpanum, men teir høvdu ikki marginalirnar við sær. Tá ið dómarin bríkslaði fyri síðstu ferð var tað týðuligt, at teir í ÍF kendu tað soleiðis, sum at teir høvdu vunnið eitt stig, meðan sumbingarnir kendu tað soleiðis, at teir høvdu tapt tvey stig.

Næsta leygardag skal ÍF spæla á Svangaskarði, meðan Sumba fer at hava heimavøll í grannastríðnum ímóti VB. Í átjanda og síðsta umfarinum, sum verður á skránni 4. oktober, skal Sumba til Fuglafirðar. Nú kappingin er hálvrunnin, er ÍF greitt oddalið, og teir mugu metast sum greiðir favorittar at endurvinna plássið í bestu deildini, sum teir mistu í 1999.



TB-B71 3-1 (2-1):

# Aldursforsetin varðveitir møguleikan

**TB er framvegis við í stríðnum um uppflyting eftir sigurin á heimavølli ímóti B71. Dan Mortensen fekk tvey mál, og Eli Hentze varð rikin av vølli**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

Tað vóru tvey lið, sum høvdu ymisk mál at stríðast fyri, ið møttust á Sevmýri leygardagin. TB skuldi berjast fyri at halda fast í oddastríðnum, meðan B71 skuldi royna at sleppa burtur frá niðurflytingarvandanum.

Tað endaði við einum uppibornum 3-1 sigri til tvøroyrarmenn, men tað var tó B71, sum legði seg framum tíðliga í dystinum.

Eftir innlegg úr høgru fær Jónsvein Thomsen skavað bóltin til sín, hann snarar runt um seg sjálvan og langar bóltin í netið. Eitt vakurt mál og sandoyingar trúðu uppá ein heldur óvæntaðan sigur.

### TB vendi gongdini

Eftir hetta fekk TB tó tamarhald á spælinum, og spælið gekk mest fyri seg á hálvuni hjá B71. Heimaliðið megnaði eisini at venda einum hóttandi tapi til eina leiðslu fyri steðgin, og tað var miðvallargeneralinum Dan Mortensen fyri at takka.

Fyrst skoraði hann útjavnandi málið, tá hann fekk fatur á eini aftur-legging frá einum B71 verjuleikara. Hesin møguleikin kom heldur tilvildarliga, men Dan var skjótur á rætta staðnum.

Síðani legði hann TB framum við einum vøkrum máli. Dan fekk bóltin í vinstra borði, rak tvørtur um og langaði so til eftir jørð, og bólturin fór í kassan.

Tað betraði ikki um umstøðurnar hjá B71, at liðformaðurin Eli Hentze varð rikin av vølli. Hetta var eftir eina hending, har Eli og Bárður Dimon hjá TB vóru áfastir. Linjuverjin varnaðist tilburðin og gjørdi dómaran varugan við hetta. Endin var, at Eli fekk reyða kortið, og so mátti B71 stríðast við bert tíggju monnum.

Eftir steðgin hevði TB fult tamarhald á støðuni og legði trýst á sandoyingar. Tað kom tó bert eitt mál afturat í dystinum. Hetta átti Rasmus Nolsøe, tá hann sendi eitt fríspark beinleiðis í netið.

TB kundi fingið fleiri mál, men vantandi neyvleiki í avgerandi løtuni hevði við sær, at einki mál spurdist burturúr.

Við sigrinum er TB framvegis við í oddastríðnum, og nú eru bert tvey stig upp til Sumba á øðrum plássi. Helst vera tað hesi bæði liðini, sum skulu stríðast um seinasta sessin, um ÍF, sum enn er ósigrað, ikki snávar.

**TB-B71 3-1 (2-1):**
0-1: Jónsvein Thomsen
1-1: Dan Mortensen
2-1: Dan Mortensen
3-1: Rasmus Nolsøe

AB-KÍ 2-2 (2-1):

## AB misti enn eitt fet

**KÍ var frammanfyri tvær ferðir, men tað eydnaðist AB báðu ferð at javna aftur**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

Klaksvíkingar fingu sítt fyrsta stig á útivølli, tá teir tað endaði við javnleiki á Argjum. AB misti hinvegin enn eitt fet í strembanini eftir uppflyting.

Tað var KÍ, sum eftir einar fimtan minuttir legði seg framum við máli frá Erling Fles. Framherjin hjá KÍ vann bóltin frá einum verjuleikara, og royndi seg við einum langskotið, ið fór eftir jørð í netið.

AB svaraði tó aftur tá umleið tíggju minuttir vóru eftir at leika av fyrra umfari. Ragnar Poul-sen, sum er fyrr í ár kom til AB úr B36, skoraði sítt fyrsta mál fyri nýggja felagið.

Hann stríddist væl í vinstra borði og slapp framvið nøkrum leikarum. Í tí hann skal skjóta uppá mál, verður hann takkladur, og John William í málinum verður snýttur, tá bólturin fer uppum málverjan í netið.

Men gleðin var stokkut. Bert fimm minuttir seinni legði Helmar Lassen AB framum aftur. Tað var Atli Jakobsen, sum setti hetta álopið í verk, tá hann setti ferð á í høgra borði. Hann legði eina langa sending tvørtur um til Erling Fles, sum sendir innfyri til ein púra leysan Helmar Lassen, ið stútar bóltin í kassan.

KÍ hevði verið betra liðið fyri steðgin og skapti fleiri málmøguleikar enn heimaliðið, sum hevði ilt við at fáa spælið at koyra.

### AB fær javnað

AB megnaði tó at fáa útjavnandi málið. Tað var Pætur Dam Jacobsen, ið stóð fyri tí. Hann fekk bóltin á miðvøllinum og setti ferð á, sneiddi fleiri KÍ-arar av og gjørdist leysur við málverjanum. Hann helt høvdið kalt og lyfti uppum málverjan til 2-2.

Eftir hetta hevði AB tveir gyltar møguleikar at fáa vinnandi málið. Fyrst gjørdist Pætur Dam Jacobsen leysur í málteiginum, men skotið fór beint í krovið hjá John Williami í málinum. Nakað seinni fekk Bernhard Petersen eisini ein opnan málmøguleika, tá ein leysur bóltur datt fyri føturnar á honum eftir hornaspark, men aftur var John William á rætta staðnum.

Hinvegin skal sigast at KÍ eisini hevði sínar málmøguleikar, og serliga Helmar Lassen var sekur í at misnýta nakrar góðar møguleikar.

AB hevur enn ein lítlan møguleika at gera seg galdandi í oddastríðnum. Fimm stig eru upp til Sumba á øðrum plássi, og enn er kappingin bert hálvrunnin.

**AB-KÍ 2-2 (1-2):**
0-1: Erling Fles
1-1: Ragnar Poulsen
1-2: Helmar Lassen
2-2: Pætur Dam Jacobsen

LÍF-VB 2-4:

## Vágbingar blanda seg í oddin

**Við einum sigri á LÍF er VB framvegis við í stríðnum um heiðursmerkir. LÍF skal hinvegin ansa sær fyri niðurflytingini**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

VB vann ein sannførandi sigur á leirvíkingum í fyrsta dystinum eftir summarsteðgin. Við sigrinum leggja teir trýst á sumbingar, sum eru beint frammanfyri. VB kann tó ikki flyta upp, tí at felagið eisini hevur lið í 1. deild.

Tað var Sigmund Mikkelsen, sum legði útiliðið framum heilt tíðliga í dystinum, og hetta var eisini støðan við steðgin.

Stutt eftir steðgin javnaði Bárður Heinason fyri LÍF, men so legði VB sjógv ímillum seg og LÍF.

Jón Pauli Olsen skoraði tvey fylgjandi mál, og Niclas Ludvig skoraði síðani til 4-1. So var dysturin í roynd og veru avgjørdur, men Fróði Joensen pyntaði um úrslitið, tá hann minkaði um munin til 4-2.

**LÍF-VB 2-4 (0-1)**
0-1: Sigmund Mikkelsen
1-1: Bárður Heinason
1-2: Jón Pauli Olsen
1-3: Jón Pauli Olsen
1-4: Niclas Ludvig
2-4: Fróði Joensen

B68-B36 0-4 (0-3):

## Toftamenn avbyrgdir

**B36 vann ein sannførandi sigur í botnuppgerðini í 2. deild á Toftum leygardagin. B68 er nú rótfest í botninum, og lítil vón er fyri, at teir kunnu lívbjarga sær**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

Í ódnarveðrinum á Svangaskarði leygardagin vann B36 seg uppum niðurflytingarstrikuna við sínum næsta sigri í landskappingini í ár.

Tað sást beinanvegin, hvat betra liðið var, tí hóast mótvind, legði útiliðið trýst á B68 málið frá byrjan av. Støðan var eisini 3-0 við steðgin, og tá var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Tað gekk tó ein løta, áðrenn B36 fekk hol á, og var tað Áki Mørk, sum hevði seinasta fótin á bóltinum. Hetta var eitt væl gjøgnumspælt álop í høgru síðu, sum endaði við, at bólturin datt fyri føturnar á Áka Mørk. Málverjin var farin úr málinum, og so skuldi Áki bara langa til.

Stutt eftir økti B36 um leiðsluna, tá sami Áki Mørk fekk sítt næsta mál í dystinum. Sonni Johansen, sum hesuferð var við øðrum liði, varð spældur leysur. Heldur enn at skjóta sjálvur legði hann tvørtur um til Áka Mørk, sum stóð betri fyri, og hann hevði lætt við at skora.

Sonni Johansen skoraði síðani sjálvur til hálvleiksstøðuna 3-0. B36 hevði fleiri aðrar málmøguleikar fyri steðgin, men tað eydnaðist ikki at fáa fleiri mál.

### Lættur sigur

B68 hevur staðið seg illa í 2. deild í ár, og teir eru stórfavorittar at flyta niður. Enn er bert eitt stig á bankabókini, og nógv mál eru farin ígjøgnum. B68 skuldi í veruleikanum hava okkurt burturúr hesum dystinum, um nøkur vón skuldi vera, men soleiðis gekk ikki.

Tað er kanska eisini heldur tunnligt við fólki á Toftum, og veteranbrøðurnir Aksel og Ingemar Højgaard spældu báðir við øðrum liði leygardagin.

B36 fekk fjórða málið miðskeiðis í seinna hálvleiki, tá Dánjal Petur Johansen skoraði til endaliga úrslitið 4-0-

Hetta var ein sera týdningarmikil sigur hjá B36, sum nú legði B71 afturum seg aftur og fór uppum niðurflytingarstrikuna.

Komandi vikuskiftið møtast júst B36 og B71 í Havn, og hesin dysturin kann fara at hava stóran týdning fyri, hvat lið skal spæla niðurflytingardyst ímóti næstovasta liðnum í 3. deild.

Um B68 skal gera sær nakrar vónir um at varðveita plássið í 2. deild, so skulu nøkur stig fáast til høldar rættiliga skjótt. Enn eru allar vónir ikki brostnar, tí B71 er bert seks stig frammanfyri, meðan munurin upp til B36 nú er átta stig.

**B68-B36 0-4 (0-3):**
0-1: Áki Mørk
0-2: Áki Mørk
0-3: Sonni Johansen
0-4: Dánjal Petur Johansen